# Lærdómin ríkari

*1. deild: FS Vágar fekk eingi stig við sær aftur úr Havnini, men hinvegin fingu teir undirvísing í, hvør munur er á at spæla fyrstu- og aðrudeildarfótbólt*



*Hóast nógv hevur verið tosað um møguligar komandi málverjar hjá B36 hetta kappingarárið, so prógvaði Tróndur Vatnhamar sunnudagin, at talan als ikki er um nakran stóran trupulleika hesum viðvíkjandi*

**Mynd: Álvur Haraldsen**

Jákup Mørk

B36-FS Vágar 6-1 (3-0)

Tá vágamenn sunnudagin løgdu leiðina til Havnar, mundi tað vera við vónum um eitt líkinda úrslit. Ikki tí, B36 hevði higartil í kappingarárinum sýnt gott fótbóltsspæl, og teir høvdu eisini vunnið teir báðar dystirnar, sum teir higartil høvdu leikt. Hinvegin hevði FS Vágar eisini sýnt góðar taktir, bæði í lands- og steypakapping, so tað mundi helst ikki vera nakar, sum væntaði, at talan skuldi gerast um eina rættuliga uppvísing frá oddaliðnum.

### Ætlanin fór fyri skeyti

Ta dysturin var liðugur, vísti máltalvan, sum rættuliga sigandi stendur beint við tennisvøllin, at heimaliðið hevði fingið seks mál, meðan gestirnir bert fingu tað eina.

At talan sostatt skuldi gerast um rættligan stórsigur, vóru helst fleiri orsøkir til. Ein hin størsta mundi tó vera, at tað tóktist eins og vágamenn høvdu ov stóra virðing fyri heimaliðinum.

Í øllum førum løgdu teir sera varliga fyri. Helst við tí fyri eygað at forða vandamiklu álopsleikarunum hjá B36 at gera nakað um seg, men longu eftir 12 minuttum varð henda spælið ætlan oyðiløgd. B36 hevði fríspark í vinstru síðu, bólturin varð rullaður nakað útfrá til Mikkjal Thomassen, sum royndi seg við skotið. Skotið var hart, men hels hevði eingin vandi verið á ferð, um ikki Jens Kristan Hansen stakk høvdið fram, og á tann hátt beindi bóltin upp í málhornið.

Vágamenn tóktist nakað ráðaleysir, nú spæliætlanin varð oyðiløgd somikið tíðliga. Verjuspælið var nú ikki eins konsentrerað, sum í byrjanini, og fram eftir vøllinum hendi heldur ikki tað stóra. Ikki tí, álopsleikararnir royndu sítt, men teir fingu alt ov lítlan stuðul frá miðvøllinum, og varð uppgávan hjá B36 verjuni sostatt lættari enn neyðugt.

Betri varð støðan ikki av, at John Petersen tvær ferðir innan lítið korter slapp at royna seg frá 11-metra blettinum, og báðu ferðirnar góvu royndirnar mál.

Fyrra brotssparkið kom eftir at hond hevði verið á bóltinum inni í brotsteiginum, meðan seinna brotssparkið varð dømt, eftir at Ronnie Samuelsen varð togaður niður, tá hann royndi at fáa høvdið á eitt innlegg úr høgru síðu.

Stutt fyri seinna brotssparkið kundi John Johansen minkað um munin, tá hann gjørdist púra leysur innanfyri B36-verjuna. Hevði royndin givið mál, kundi talan kanska verið um ein heilt annan dyst, men Tróndur Vatnhamar kom væl út úr málinum, og megnaði at verja fyri.

Ístaðin gjørdist støðan stutt eftir 3-0 til heimaliðið, og so var dysturin í roynd og veru avgjørdur.

### Kundi verið meira

Hetta var eisini sjónligt, tá liðini fóru á vøllin til seinna hálvleik. Vágamenn royndu nú at sleppa sær nakað niðan á vøllin, men aloftast gekk spælið ov seint til at gerast rættuliga vandamikið.

Hinvegin hevði B36 nú hópin av møguleikum at økja um leiðsluna. Ronnie Samuelsen gjørdi tað til 4-0, tá hann hegnisliga tamdi bóltin inni í brotsteiginum, áðrenn hann varð sendur flatt við handara stólpa. John Petersen fekk sítt hattrick, tá hann ótarnaður slapp at seta høvdið á eitt frísparksinnlegg frá Mikkjali Thomassen, og innskiftið Kenneth Jacobsen mundi gera vakrasta málið í dystinum, tá hann staddur beint uttanfyri brotsteigin hálvfluktaði ein returbólt upp í handara málhorn.

Stutt undan seinasta B36-málinum hevði Tór-Ingar Akselsen minkað um munin. Hetta hendi eftir deyðbóltsstøðu, sum sær út til vera nakað serliga hjá vágamonnunum. Ari sendi hart og skrúvandi innfyri, og meðan Tróndur stóð og bíðaði eftir bóltinum, setti Tór-Ingar fótin á.

Umframt málini, hevði B36 hópin av møguleikum, so sigurin kundi lættliga verið nógv størri. Tað tóktist tó sum um leikararnir vóru nøgdir við sýnda avrikið, og tá mótstøðumenninir so at siga høvdu givið skarvin yvir, kom hvørki sigurin ella støddin av hesum í rættuligan vanda.



*John Johansen einsamallur móti B36 málinum. Møgueikin varð misnýttur, og tá B36 stutt eftir hetta fekk brotsspark, var dysturin so at siga avgjørdur*

**Mynd: Álvur Haraldsen**

### Fingu lærdómin við

Sostatt fóru vágamenn úr Gundadali sum av torvheiðum. Heilt tómhentir fóru teir tó ikki, tí við sær fingu teir í øllum førum dýran lærupening um, hvussu stóru munurin er á bestu og næstbestu fótbóltsdeildini.

Møguliga var talan bert um ein ringan dag hjá FS Vágum, men í øllum førum fingu teir staðfest, at teir ikki fáa nakað sum helst forerandi, tá spælt verður á hesum støði. Tað vilja altíð koma dystir, har rættuligt glið ikki kemur á spælið, men tá er neyðugt at bróa upp um armar, og nýta stríðsviljan, har fótbóltsspælið ikki røkkur.

Hetta gloymdu leikararnir hesu ferð, og sum nevnt, so máttu teir eisini gjalda dýran lærupenga fyri hetta.

Málið hjá vágaliðnum er tó fyri fyrst at stabilisera seg í bestu deildini, og helst kunnu teir ugga seg við, at tað neyvan verða fleiri av kappingarneytunum, sum taka stig í Gundadali, so í so máta var hetta kanska ikki býttasta staðið at rinda hesar lærupengar.

### Stevna einsamallir avstað

Sigurin hjá B36 hevði, saman við úrslitunum í hinum dystunum, við sær, at yngra høvuðssatðarliðið nú er einsamalt á odda í bestu deildini.

Undan kappingarársbyrjan mundu tað ikki vera nógv av viðhaldsfólkunum, sum høvdu somikið høgar vónir um lið sítt, og hóast tað enn er nakað stutt útliðið á fótbóltsárið, so byrjar liðið longu nú at líkjast einum góðum boðið til í øllum førum luttøku í toppstríðnum.

Upp á stutta tíð hevur svenski venjarin fingið sett eitt vælspælandi lið saman, men grundarlagið undir hesum byggir í stóran mun á gamlar dygdir, so sum stríðsfúsni og samanhald. So at siga allir mans arbeiða hart fyri liðnum, og hetta viðførdi, at teir í stórum parti av dystinum fingu lagt eitt rættuliga áhaldandi trýst á vágaliðið.

Talan var tó kanska um eina bíliga bakgrund sunnudagin, men stigini, sum liðið hevur fingið higartil, verða so ikki tikin frá teimum.

**B36-FS Vágar 6-1 (3-0)**

1-0 Jens Kristian Hansen 12.
2-0 John Petersen 27. (br.)
3-0 John Petersen 40. (br.)
4-0 Ronnie Samuelsen 48.
5-0 John Petersen 73.
5-1 Tór Ingar Akselsen 76.
6-1 Kenneth Jacobsen 86.

Dómari: Lassin Isaksen

**B36:**
Tróndur Vatnhamar - Herbert í Lon Jacobsen, Egil Zachariasen, Mikkjal Thomassen - Bjarni Prior, Jan Guttesen, Jens Kristian Hansen, Magni á Lakjuni - John Petersen, Ronnie Samuelsen, Jákup á Borg

**FS Vágar:**
Remigius Mikoliunis - Emil Hentze, Zilvanius Zudus, Darius Magdisauskas, Jonsvein Olsen - Rimvydes Bakus, Albert Ari Thomassen, Hannus Olsen, Tór-Ingar Akselsen - Birgir Joensen, John Johansen





*Sandoyringar royndu frá byrjan at leggja stóran dent á verjupartin, har Jón Brekku hevði til uppgávu at stýra*

**Mynd: Jonhard Hammer**

# B71 misti í evstu løtu

*Tað var um reppið, at sandoyingar fingu fulla úrtøku annað vikuskiftið á rað, men við einum ótrúligum langskotið frá Bartali Eliasen megnaði GÍ at fáa annað sigið við heimaftur*

Jákup Mørk

B71-GÍ 2-2 (2-0)

Undan kappingarársbyrjan vóru helst mong, sum høvdu hug at seta B71 skeivu megin niðurflytingarstrikuna, tá gitt varð um, hvussu ymsu liðini fóru at standa seg í 2000-útgávuni av landskappingini.

Nú trý umfør eru leikt, hava sandoyingar tó longu ognað sær fýra stig, og havandi mótstøðuliðini í dystum í huga, er als ikki óhugsandi, at samlaða úrtøkan fer at verða ivaleysa góð til at bjarga teimum lívið í fremstu deildini.

Tá teir fyri viku síðani vunnu í Vági, skuldi tó eitt málmansavrik av teimum heilt stóru til, áðrenn stigini vórðu bjargað, og við góðari hjálp frá Waldemar Nowicki, var tað um reppið, at teir eisini fingu fulla úrtøku burtur úr dystinum á Sandi móti GÍ.

### B71 fekk málini

Gongdin í dystinum sunnudagin var hin sama, sum hon so ofta hevur verið, tá B71 er annað liðið á vøllinum.

Við skilagóðum verjuspæli royndu teir at byrgja fyri gøtuálopunum, fyri síðani at satsa upp á kvik mótálop, har bólturin við fáum millumstøðum skal fáast niðan í brotsteigin hjá mótstøðuliðnum.

Hetta spæl hevur fyrr verið viðvirkandi til fleiri góðar sigrar, og hóast liðið ikki er eins sterkt, og tað var í eitt nú 1989, so er hetta framvegis ein uppskrift, sum kann kasta nøkur stig av sær.

Í Waldemar hevur liðið eisini ein sera tryggan aftasta skansa, og sunnudagin prógvaði hann enn einaferð, at aldurin er eingin forðing hjá einum málverja. GÍ hevði nevnliga bóltin rætutliga fittan part av tíðini fyrstu trý korterini, og teir megnaðu eisini at leika seg fram til nakrar góðar møguleikar. Pólverjin vardi tó fyri tí, sum kom, og ístaðin kundi sandoyingar tvær ferðir skjóta bóltin í málið.

Fyrsta málið kom, tá góðir 20 minuttir vóru leiktir. B71 átti fríspark í høgru síðu, og tá bólturin varð sendir innfyri, var Jógvan Jón hægstur, og kundi hann beina bóltin í málið til 1-0.

Tíggju minuttir seinni var aftur vandi á ferð framman fyri GÍ málið. Eftir skjótt mótálop varð bólturin stungin fram til nýggja leikaran hjá B71, danan Alex Nielsen, sum við skjótleika sínum slapp inn um GÍ verjuni, og hegnisliga lobbaði hann bóltin upp um Sunnvard Joensen, sum kanska var nakað uttarlaga staddur.

### GÍ átti alt

Høvdu gøtumenn havt eitt hampuligt trýst á sandoyingar í fyrra hálvleiki, so var hvaðna verri hjá heimaliðinum í seinna.

Frá teirri løtu teir komu á vøllin eftir hálvleiksssteðgin, áttu gøtumenn so at siga alt spælið. Sandoyingar løgdu seg kanska ótilvitað ov aftarliga á vøllinum, og hetta viðførdi eisini, at konstruktivum kontraspæli var lítið og einki av seinnapartin av dystinum.

Gøtumenninir fingu eisini hópin av málmøguleikum burturúr trýstinum, og tá níggju minuttir vóru farnir av seinna hálvleiki, hevði Súni Olsen minkað um munin. Hetta hendi tá gøtumenn vunnu bóltin á miðvøllinum, og beinanvegin varð Súni leiktur leysur. Staddur nakað til vinstru á brotsteigarmarkinum langaði hann til, og bólturin sat í netinum uttan møguleika hjá Waldemar.

Sum nevnt, so høvdu gøtumenn fleiri heilt góðar møguleikar eftir hetta, men framvegis vardi Waldemar fyri so at siga øllum, og var tað ikki fyri einum ótrúligum máli frá Bartali Eliasen, so vóru øll stigini verandi á Sandi.

Staddur einar 30-40 metrar úti frá málinum royndi Bartal seg við langskotið, og í eini beinari linju fór bólturin heilt upp í málhornið. Waldemar mundi tó eisini bjargað hesi royndini, men av Sandi frætta vit, at hevði hann megnað at vart fyri hesum, so høvdu tey helst verið noydd at reist eina standmynd av pólverjanum, somikið hart og gott var skotið hjá Bartali.

### Er á eini leið

Sandoyingarnir hava nú fingið fýra stig burtur úr teimum trimum fyrstu dystunum, og hetta munnu teir eisini vera nøgdir við, havandi mótstøðuliðini í huga.

Hetta ásannaði liðskipari teirra, Eli Hentze, eisini eftir dystin sunnudagin, men kortini iðraði hann seg um, at teir ikki høvdu fingið meira burtur úr teimum báðum heimadystunum, sum teir higartil hava leikt.

- Móti HB taptu vit tepurt, og her varð tað so javnleikur, hóast vit í hálvleikinum vóru á odda við tveimum málum. Hinvegin vóru vit undir einum øðiligum trýsti í Vági, so samanumtikið mugu vit nokk vera nøgdir, segði Eli um gongdina higartil.

Eru sandoyingar nøgdir um úrtøkuna higartil, so munnu gøtumenn ikki sita við heilt somu kenslu. Ikki tí, undan kappingarársbyrjan vildu teir vera við, at teir helst ikki fóru at verða eins eyðsýndir í ár, sum teir hava verið í nítiárunum. Hinvegin er ongantíð stuttligt at vera í miðjuni, tá tú ert vanur at halda til ovarlaga á stigatalvuni.

Enn er tó stutt útliðið á árinum, og um eina viku hava gøtumenn so aftur ein møguleika at toga seg nakað upp eftir stiganum. Talan verður tó ikki um nakra lætta uppgávu, tá verandi føroyameistararnir úr Klaksvík koma á vitjan. Higartil hava klaksvíkingarnir tó ikki sýnt nakað meistaraspæl enn, og við sigri á KÍ kann GÍ enn einaferð prógva, at teir eisini eiga at roknast við, tá tosað verður um, hvussu málmurin skal býtast hetta kappingarárið.

**B71-GÍ 2-2 (2-0)**

1-0 Jógvan Jón Petersen 21.
2-0 Alex Nielsen 31.
2-1 Súni Olsen 54.
2-2 Bartal Eliasen 79.

Dómari: Oddmar Andreasen

**B71:**
Waldemar Nowicki - Bernhard Petersen, Jón Brekku, Jógvan Jón Petersen - Rúni í Soylu, Kári Sørensen, Julian Florescu, Eli Hentze, Kári Nielsen - Høgni Hansen, Alex Nielsen

**GÍ:**
Sunvard Joensen - Áslakur Petersen, Bartal Eliasen, Martin Thomsen, Súni Olsen - Magni Jarnskor, Jóan Petur Olsen, Pauli Jarnskor - Henning Jarnskor, Helgi L. Petersen, Rúni Justinussen

# Rutinan sigraði

*2. deild: GÍ fekk fyrstu stigini í ár, tá teir vunnu heimadystin á B36*

Jákup Mørk

GÍ-B36 2-1 (1-1)

Vónirnar hjá B36 um stig í Gøtu mundu vera hampuliga góðar, eftir sannførandi avrikið móti KÍ fyri viku síðani. Spælið tað ferðina bendi í øllum førum ikki á, at liðið ætlar sær niður aftur í triðju deild fyribils, og tá gøtumenn samstundis ikki tykjast hava nakra stóra breidd í sínum leikarahópi mundu havnarmenninir vera favorittar, tá teir leygardagin skuldu á vøllin í Gøtu.

### Byrjaðu bragdliga

B36 liðið er fyri tað mesta mannað við ungum og evnaríkum leikarum, og hesir fóru við fullum huga til verka móti GÍ, sum ikki hevði eitt heilt so ungt lið til dystin.

At byrja við var eisini líkt til, at kviku unglingarnir hjá B36 vóru ein ov stóru biti fyri gøtumenninar, og teir leiktu seg eisini fram til góðar møguleikar.

Mál fingu teir tó bert eitt, tá Rógvi Róin varð leiktur púra leysur, og einsamallur við málverjanum kundi skjóta bóltin í málið. Frammanundan hesum hevði Rógvi annars havt ein risa møguleika, men í evstu løtu fekk verjuleikari hjá GÍ vart fyri.

Hóast ringu byrjanina, so mistu GÍ leikararnir á ongan hátt mótið. Liðið telur fleiri royndar leikarar, og við hesum á odda royndu gøtumenninir nú at stríða seg innaftur í dystin. Tað eydnaðist teimum eisini at javna, tá skjóti Heini Heinason varð leiktur leysur í høgra borði. Hann gjørdi skjótt av og langaði bóltin framvið B36 málverjanum, soleiðis at tað aftur stóð á jøvnum, tá farið varð til hálvleiks.

### Aftur Heini

Í seinna hálvleiki gekk rættuliga javnt á, og bæði liðini royndu at fáa sær málið, sum kundi koppað dystinum til egnan fyrimun. Líkt var tó ikki til, at nøkur avgerð skuldi fella, men móti endanum av dystinum var heini aftur á rætta staðnum.

Janus Rasmussen royndi seg við skotið útifrá, sm Pól Næs Joensen hálvbjargaði. Bólturin støkk út aftur í spæl, og eftir at málverjin í tveimum atløgum fekk vart fyri, megnaði Heini at enda at seta seinasta fót á, soleiðis at gøtumenn nú vóru á odda.

Gøtumenn megnaðu eisini at halda skansan, tað sum eftir var av hálvleikinum, og sostatt ognaðu teir sær fyrstu stigini á árinum.

### Skula halda fast

Fyri bæði liðini er aðalmálið helst at teljast millum átta tey ovastu liðini, tá avtornar, og hetta man helst eisini fara at eydnast teimum.

GÍ liðið telur fleiri leikarar við drúgvum royndum frá fyrstudeildarfótbólti, og hetta átti at borgað fyri nóg stórum støðufesti til varveitslu av sessinum,

B36 liðið hevur ikki somu royndirnar, men hinvegin eru evnini og orkan somikið góð, at talan helst skuldi blivið til fleiri stig, soleiðis at eisini teir kunnu halda sessin í deildini.

**GÍ-B36 2-1 (1-1)**

0-1 Rógvi Róin
1-1 Heini Heinason
2-1 Heini Heinason

